# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Fólkaræði í verki

Morgindagurin er fólkaræðisins merkisdagur, dagurin, tá veljarin einsamallur hevur orðið. Fyri nøkrum er dagurin at meta sum politiskur dómadagur. Har ein glæsilig starvsleið kanska endar, meðan dagurin fyri uppaftur onnur gjørdist byrjanin til eina heilt nýggja lívsleið í politikki.

Vit hava sonevnt umboðandi fólkaræði, har vit, tað vil siga øll, sum hava valrætt, velja fólk á løgting at umboða okkum. Grundsjónarmiðið er, at vit velja eftir politiskari áskoðan, og at vit býta okkum upp í politiskar flokkar alt eftir politiskari áskoðan, tvs. eftir hvussu vit halda, at samfelagsvirðini skulu býtast. Føroyar eru við teimum politisku avmarkingum, sum ríkisfelagsskapurin ber í sær, eitt av heimsins elstu demokratium. Føroya Løgting, sum stovnur er ikki bert elsta ting í Norðurlondum men elsta lóggávuting í Europa og hartil møguliga elsta ting í heiminum.

Tað liggur tí ein sera stór ábyrgd á teimum, sum í morgin verða kosin at manna hetta gamla parlament. Hesi fólk skulu taka stórar og álvarssamar avgerðir okkara vegna, og hvør einasta avgerð tikin á løgtingi ávirkar hvønn einasta føroying. Tingmenn, konur sum menn, eiga støðugt at hava hetta í huga, nevniliga, at tey sita á tingi ikki fyri teirra egnu skuld men fyri at umboða alt Føroya fólk. Tingmenn hava vælferð Føroya fólks í sínum hondum og ráða í stóran mun fyri lagnum okkara. Tað ræður tí um, at tey, sum í morgin á demokratiskan hátt verða vald, taka sína uppgávu í allarstørsta álvara og onga løtu gloyma, hví tey eru vald og hvønn tey umboða. Hetta merkir eisini, at tingmenn eiga at sýna hvørjum øðrum og sjónarmiðjunum hjá hvørjum øðrum virðing og hartil eiga at samstarva í mest møguligan mun.

Tað liggur eisini ein serstakliga stór ábyrgd á veljaranum í morgin. Valrætturin telist millum fremstu mannarættindi. Dagliga hugsa vit tíverri lítið um, hvussu djúpt priviligerað vit eru, sum búgva í einum fólkaræði. Í fólkaræði er valdið hjá fólkinum, og fólkið útinnir hetta vald við at fara á val hvørja ferð, ið val til lóggávuting verður hildið. Latið okkum tí øll, kvinna sum maður, ung og gomul fara mansterk á val í morgin. Stór valluttøka er stimbrandi og mennandi fyri fólkaræðið. Tá morgindagurin er av, verða nøkur ovurfegin, meðan onnur verða djúpt vónbrotin. Soleiðis eru treytirnar. Tað ræður tí um, at teir flokkar og teir persónar, sum fáa álit og vald á valinum, eftirfylgjandi liva upp til sína ábyrgd og stýra soleiðis, at næsta valskeið verður allari tjóðini til gagns og vælferðar.

**Sosialurin**

# Ring nátt fyri valplakatirnar

**Veðurmaðurin Petur Skeel boðar frá nógvum vindi í nátt, og ófýsiligum veðri í morgin, sjálvan valdagin**

Seinastu dagarnar eru býir og bygdir prýdd við alskyns valplakatum. Men óhugsandi er ikki, at skulu fólk njóta hesar, so má tað gerast í dag.

Í nátt verður nevniliga sagt frá nógvum vindi, kanska upp í storm av vestri, serliga sunnanfyri oyggjarnar.

- Tað verður nógvur vindur í nátt, kanska heilt upp í 20 m/s, sigur kendi veðurmaðurin.

Í morgin minkar hann vindin nakað, niður í eini 13 til 15 m/s. Tað verður eisini ælingur, partvíst sum kavi. Hitin verður beint oman fyri frostmarkið.

- Tí kann væntast at valveðrið verður eitt sindur ófýsiligt, sigur veðurmaðurin.

Sunnudagin verður kortini frægari veður við vindi av útnyrðingi, kavaælum og sólarglottum.

**sb.**

# Skattalættið = Vælferð

**SÍMUN Á HØVDANUM**
Tranbjerg J.



Eg vil heita á allar føroyingar at tonkja seg væl um tann 19. januar. Vit í Danmark høvdu val síðst í 2007 og har var stóra evni í valstríðnum, at lækkaði man skattin, so minsti man vælferðina, men tað er prógvað, at soleiðis er tað ikki. Føroyar og Danmark hava aldrin upplivað so góðar tíðir sum júst nú, og eg pástandi, at høvuðsorsøkin er tann, at bæði londini miðvíst hava lækkað skattin. **Lækkar man skattin, so veksur vælferðin, og arbeiðsloysi minkar.** Fólk hava hug at arbeiða meira, og hetta førir við sær, at meira pengar koma í landskassan. Mín áheitan á Føroya fólk er, veljið flokkar sum vilja lækka skattin, hetta ger, at Føroyar vera kappingarførar við útlandið, og á tann hátt varðveita vit vælferðina.

Gott val øll somul.

# Dag og nátt og øktir tvær í hørðum Húnastríði




**HERGEIR NIELSEN**
Tjóðveldi

Tá samgonguslit var í 1980, segði Atli Dam, sáli, seg ikki kunna liva við bara at umsita fólkaflokspolitikkk.

Tað sum ikki bar til tá, ber kortini væl til í dag, tí jvfl. hevur slept øllum sosialum medviti, meðan fófl. er vorðin heimastýrisflokkur.

Vit keypa fyri eina milliard meira enn vit selja fyri á hvørjum ári, og landshúsarhaldið verður rikið við dundrandi halli.

400 mió.kr. eru brúktar í skattalættum til at skapa ein søguliga ókendan stættamun í Føroyum.

Milliardir eru drenaðar út úr vinnuni, skipini hava fleirfalda skuldina, og eiga nú ikki fyri olju.

Almanna-, heilsu- og skúlaverkið liggja í ovurstórum ráðaloysi, fólk rýma úr størvunum, og sorgarsøgur eru gerandiskostur.

Kaos valdar inneftir, og kaos valdar úteftir.

Alt vald varð lóggivið burtur frá føroyingum í Føroyum og Norðurlandaráðið, EFTA og EBS eru tí ikki nakað fyri føroyingar.

Altjóða sáttmálar, Kyoto og Lívfrøðiligt margfeldi, eru galdandi á umhvørvisøkinum, men vit liva og láta, sum um teir als ikki vóru til.

Tilvildin valdar á øllum økjum, og ikki so frægt sum eitt uttanríkispolitiskt orðaskifti hevur verið á tingi í samfull fýra ár.

Og soleiðis kundi vit hildið fram.

Øvugt orð er ikki fallið millum fólkaflokkin og javnaðarflokkin á nøkrum fundi nakrastaðni.

Vit skulu ikki læra av mistøkunum, siga teir og vit skulu ikki tosað um tað farna. Gera vit tað kortini, so grenja vit, siga kaospilotarnir.

Vit skulu bara hyggja frameftir. Alt aftanfyri og til viks er ikki nakað fyri okkum, verður sagt. Vit halda fram, og alt gongur upp á stás, siga tey sjálvklóku.

Fýra ár koma tó ikki upp á tal, tí føroyska samfelagið rennur seg fast innan stytri tíð enn so.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.